# BÝRÁÐSFUNDUR

## Vágs Býráð

**Dagfesting:** 01.02.2018 kl. 19:00
**Málnr.:** 17/00001

Nevndarlimir:: Dennis Holm
Eydis Kjærbo
Kirstin Strøm Bech
Levi Mørk
~~Anna Brattaberg Samuelsen~~
Eyðbritt Krosslá
~~Dánjal Bjarkhamar~~
~~Conrad Gaard Joensen~~
~~Erhard Joensen~~

Vara limir: Meinhard Edmund Vestureið, Marin Gaardlykke.

Ikki møtt: Danjal Bjarkhamar (avboð), Anna Brattaberg Samuelsen (avboð), Erhard Joensen (avboð), Conrad Gaard Joensen (avboð).

Nevndarskrivari: Pól Thorsteinsson


| Málsyvirlit | | | Síða |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | | |
| 1/18 | 18/00001-2 | Umsókn um sundurbýti, matr 172a | 2 |
| 2/18 | 18/00018-2 | Keyp av grundstykki, matr. 500h, Gjógvarávegur 27 | 2 |
| 3/18 | 17/00460-5 | Umsókn um byggiloyvi til umbygging/umvæling á matr, 373, Garðabrekka 2. | 3 |
| 4/18 | 18/00002-2 | Umsókn frá SEV um leggjan av háspenningskaðalar um Vágsfjørð | 4 |
| 5/18 | 18/00024-1 | Bókasavn, roknskapur 2017 og FÆ2019 | 5 |


Býráðið samtykti, at varalimir tóku sæti fyri Conrad G Joensen og Erhard Joensen.

## 1/18 Umsókn um sundurbýti, matr 172a

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska- og umhvørvisnevndin | 16.01.2018 | 4/18 | 18/00001-2 |
| 2 Vágs Býráð | 01.02.2018 | 1/18 | 18/00001-2 |

Bjarki og Sigurd Magnussen skulu gera tríggjar nýggjar matriklar A , B og C (ikki teknað á kortið) á matr 172a (D). Stykkið liggur í bústaðarøkið B, har ein partur er frílendi, har ikki má byggjast á.

Stykkið A og B er mált til 20mx25m, men stykki C er ikki endaliga ásett enn, men tað skal verða 500 m2 tilsamans.

Stykkið A skal verða ogn hjá Bjarka Magnussen, og Sigurd Magnussen skal standa fyri stykki B.

Servitutturin skal verða á tí eystasta stykkinum.

Støða skal takast til um loyvi at loyva frábýtið av stykkið A, B, og C frá matr. 172a.

**Tekniska- og umhvørvisnevndin 16. januar 2018:**
Standard umsóknarblað frá Matrikulstovuni skal fyriliggja til býráðsfundin.
Nevndin viðmælir at játta hetta.

**Vágs Býráð 01. februar 2018:**
Einmælt samtykt, at taka undir við Teknisku- og umhvørvisnevndini.

## 2/18 Keyp av grundstykki, matr. 500h, Gjógvarávegur 27

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska- og umhvørvisnevndin | 16.01.2018 | 5/18 | 18/00018-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.01.2018 | 2/18 | 18/00018-2 |
| 3 Vágs Býráð | 01.02.2018 | 2/18 | 18/00018-2 |

Andrea Nielsen hevur sent umsókn inn um ynski at keypa grundstykki á matr. 500h. Gjógvarávegur 27. Prísurin fyri grundstykki er 50.000 kr.

Vágs Kommuna bjóðaði 23. August 2017 grundstykkir til almenna sølu sambært kunngerð nr. 122 frá 22 des. um alment útboð av kommunalari fastogn.

**Tekniska- og umhvørvisnevndin 16. januar 2018:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum. Málið verður lagt fyri býráðið.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2018:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum og beina málið í býraðið.

**Vágs Býráð 01. februar 2018:**
Einmælt samtykt, at selja stykkið.

## 3/18 Umsókn um byggiloyvi til umbygging/umvæling á matr, 373, Garðabrekka 2.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska- og umhvørvisnevndin | 16.01.2018 | 6/18 | 17/00460-5 |
| 2 Vágs Býráð | 01.02.2018 | 3/18 | 17/00460-5 |

Vágs Kommuna hevur móttikið umsókn um byggiloyvið av ognini á Garðabrekka 2, matr.nr 373.

Talan er um eini gomul sethús, har Café nýligani er opna í kjallarahædd. Ynskið hjá eigara er, at skifta tekju, klædning og vindeygu, og annars ístandgera mið- og ovastu hæddirnar, har bústaður skal vera. (Talan er ikki um uppíbygging)

Við umsóknini eru innsendar tekningar av innrætting, har rímingarleiðir er merktar grønar.

Tekniska deild hevur saman við átaksleiðaranum verði á ástaðisfundi við eigara og byggiráðgevara eigarans.

Tekniska deild mælir til at byggiloyvið verður givið sambært byggningskunngerðina, við teimum viðmerkingum sum eru nevndar í fundarfrásøgnini til ástaðisfundin 3 januar18.

**Tekniska- og umhvørvisnevndin  16. januar 2018:**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá Teknisku deild. Verður lagt fyri býráðið til kunningar.

**Vágs Býráð 01. februar 2018:**
Kunnað.

## 4/18 Umsókn frá SEV um leggjan av háspenningskaðalar um Vágsfjørð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havna- og Vinnunevndin | 16.01.2018 | 1/18 | 18/00002-2 |
| 2 Tekniska- og umhvørvisnevndin | 16.01.2018 | 7/18 | 18/00002-2 |
| 3 Vágs Býráð | 01.02.2018 | 4/18 | 18/00002-2 |

Tekniskadeild hevur frá LV móttikið hoyringsskriv til umsókn hjá SEV, at fáa loyvið til at leggja 4 sjóðkaðalar um Vágsfjørð.

Kaðalanar verða lagdir á landi frá Vágsvirkinum hjá SEV á Oyrinum, til endan av grótkastinum/pirðinum, og haðani um fjørðin fyri at koma upp á land aftur á Marknoyri.
Av Marknoyri verða kaðalanir lagdir norður um landsvegin, og verða síðani niðurgrivnir í vegøkslina fram við vegnum heilt norður til Tvøroyri.

Tekniska deild hevur havt ástaðisfund við LV og SEV um ætlanina, har TD heitti á partarnar um at taka atlit til ferðslutrygdina á vegastrekkinum Marknoyri og Nes. TD vísti á, -at orsakað av at ongin gongubreyt er á Nesvegi- síggjast fólk javnan til gongu á koyribreytina. TD legði tí upp til, at henda verkætlanin førdi við sær, at vegøkslin bleiv breiðka somikið, at gongubreyt bleiv gjørd framvið Nesvegi av Markenoyri og eystur til vestari íbindingina á Nesi, har bussteðgipláss er gjørt nýligani.

TD vísti eisini á, at verandi gøtuljós á vegastrekkinum Nesvegur ikki eru tíðarhóskandi, og heitti á partarnar um at hava við í ætlanini útskifting av gøtuljósunum við tíðarhóskandi orkusparandi LED ljós.

- Havnarmeistarin hevur onga viðmerking til ætlanina.
- TD ger vart við at Bakkafrost hevur í 2017 fingið loyvið til at leggja rør til sjógvinntak eftir botni út um grótkasti. Hetta viðførir, at kaðalanir hjá SEV, koma at krossa rørið hjá BF, og má SEV tryggja sær, at hesi ikki gera skaða á hvørt annað.
- TD mælir til at loyvið verður givið, við omanfyri nevndu viðmerking til gongubreyt og gøtuljós, og at SEV tryggjar uppmerking av kaðalinum, og ger árligt eftirlit á festir og lending.

**Havna- og Vinnunevndin 16. januar 2018:**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá Teknisku deild.

**Tekniska- og umhvørvisnevndin  16. januar 2018:**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá Teknisku deild.

**Vágs Býráð 01. februar 2018:**
Einmælt samtykt, at taka undir við Havna- og vinnunevndini og Teknisku- og umhvørvisnevndini.

## 5/18 Bókasavn, roknskapur 2017 og FÆ2019

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vágs Býráð | 01.02.2018 | 5/18 | 18/00024-1 |

Søvn Landsins skulu hava ársroknskapin fyri 2017 áðrenn 1 feb 2018. Býráðið skal hava samtykt hann áðrenn. Samstundis er fíggjarætlanin fyri 2019 eisini gjørd.

Mælt verður til at samtykkja bæði.

**Vágs Býráð 01. februar 2018:**
Einmælt samtykt, at samtykkja bæði.

**FUNDURIN LOKIN KL. 20:00**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Dennis Holm | Eydis Kjærbo | Kirstin Strøm Bech |
| Levi Mørk | Marin Gaardlykke | Eyðbritt Krosslá |
| Meinhard E. Vestureið | | |